## DAGSINS MEINING

# Privatisering

Tað er gott, at ein frágreiðing kemur á borðið um einskiljing - ella privatisering, sum tað eitur á føroyskum. Tó má ansast eftir, at teori og praksis sampakka og at søgan í málinum verður væl og virðiliga lýst.

Ov lítið verður gjørt burturúr, hví landið er eigari av so nógvum fyritøkum í Føroyum. Tað er fínt at greiða frá lærubókatilfari, um hví man vil hava almennar fyritøkur mótvegis privatum fyritøkum, men einki stendur í lærubókunum um almenna reaktión, tá man hevur vinnuligt kollaps vegna vanstýring av somu vinnu. Sambært teimum lærubókateoriunum, ið liberalistarnir og fortalarnir fyri hópprivatisering krøkja seg uppí, skuldi hvørki Kjølbro fyritøkan í Klaksvík, Bankarnir, Fiskasølan, fiskiídnaðurin ella nakað annað verið bjargað, tí marknaðarkreftirnar nokk skuldu syrgja fyri, at onkur hóraði undan. Tíbetur vóru tað ikki slíkir naivistar, ið sótu við róðrið í 60’unum og 90’unum, tá á leikaði. Tað almenna tók um endan, har tað áðrenn var biðið um at halda fingrarnar vekk, og tí eigur landið í dag fyritøkurnar! Tað var ikki ein bevíst politisk idoelogisk tilgongd.

Tað eru minni enn tíggju ár síðani, at bankarnir og fiskiíðnaðurin vóru bjargaði, og tí er tað í so tíðliga at tosa um, at tað er "í ósamsvar við fólkaræðisliga hugsjón", at tað almenna eigur hesar fyritøkur. Tíggju ár kann verða nógv, hjá relativt óroyndum fólki, ið hava verið styttri enn tað á arbeiðsmarknaðinum, men í tí størra høpinum er tað eitt eygablikk.

Á sama hátt, sum tað er skeivt treytaleyst at ganga inn fyri privatisering, so er tað sjálvsagt eisini skeivt at verða treytaleyst ímóti. Eitt nú burdi man kanska diskutera at selja partabrøv í Føroya Tele, og kanska síggja fremmandar íløgur í hetta felag sum ein møguleika at menna felagið tekniskt. Palliba skal tó fáa hvørt oyra aftur og helst væl afturat fyri at selja nakað av landsins ogn.

Hví skal alt nú privatiserast? Er tað tí, at Fólkaflokkurin vil loyva ávísum kreftum framat aftur fatinum? Er tað tí, at Tjóðveldið vil fíggja fullveldið? Er tað tí, at fyritøkurnar verða betri riknar á privatum hondum? Um tað er tað síðsta, so vísir søgan okkum eitt annað. JFK hevur verið ein vælrikin fyritøka á almennum hondum í útvið fjøruti ár. Bankar eru farnir fleiri ferð á heysin á privatum hondum og ganga betur enn nakrantíð á almennum hondum. Generaliseringar nytta ikki nógv, tá nú søgan vísir nakað annað.

Vónandi fer ein og hvør privatisering fram við størsta varsemi, tí søgan hevur tað fyri at endurtaka seg, og so er tað aftur skattgjaldarin, ið noyðist at taka um endan og rudda upp eftir spekulantunum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Viðv. ríðigøtum í Suðurstreymi

**Leif Berg**
*vegna BERG-Hestar*



Mitt í november vendi eg mær seinast til VMS um málið at seta í stand og halda viðlíka tær gøtur í Suðurstreymi, sum LV hevur gjørt og eigur. Hesar gøtur eru tær, ið verða mest brúktar til at ríða eftir, og sum tískil hava størstan týdning fyri, at tað ber til at hava ríðing sum part av ferðavinnuni í økinum.

Síðan Maria Róin ringdi til mín, eftir at hon í vár hevði lisið eitt viðtal í Sosialinum, havi eg einki frætt frá VMS, um nakað røkist fyri at fáa eina skipan við aðrar myndugleikar og stovnar um nevndu ístandgerð og viðlíkahald.

Loyvi mær at spyrja, hvussu gongst við málinum.

Loyvi mær somuleiðis at leggja við hesum brævi avrit av tí skrivi til Ferðaráðið og kort yvir nevndu gøtur, sum eg eftir áheitan frá Hera Niclasen sendi ráðnum eftir ein fund, vit høvdu um hetta mál.

Vónandi kann VMS brúka hesa frágreiðing og kortið til at seta seg betur inn í hetta fyri okkum og fyri ríðingarpartin av ferðavinnuni í Suðurstreymi lívsneyðuga mál, so at tit kunnu koma til eina niðurstøðu um at loysa málið skjótast og við best møguliga úrsliti.

Frætti kanska aftur frá tykkum so skjótt, sum tit hava hugt at hesum.

# Politiyvirtøkan - enn einaferð

**Schandorff Vang**

Skakandi var at hoyra Útvarp Føroya bera tíðindi um samrøða millum Høgna Hoydal og danska løgmálaráðharran eftir vitjan teirra í Noregi nakað her fyri.

Greitt var, at talan ikki hevði verið um samráðingar, men bert eina samrøðu, har løgmáláráðharrin enn einaferð vísti Høgna á, at danir ikki ganga við til, at politiið verður yvirtikið.

Hetta skuldi eftir øllum at døma (sum ÚF bar tað fram) hava fingið øði í Høgna, sum skuldi hava verið nakað hvassorðaður og buldrandi, sum altíð. Hann hevur, eftir sum tað ljóðar, heilt greitt hótt løgmálaráðharran og borið fram, at "so gera vit tað bara álíkavæl" og so mugu danir taka tað, sum tað er.

At tað so er komið til linnan og danir siga seg vilja bøta um hetta við serligum lógum, er bert at harmast um. Vónandi koma hesir serfrøðingar á økinu til fornuft og lata politiið verða har tað er í dag - felags við danir.

Men er ein tílík serlóg ikki at tulka sum broyting av Heimastýrislógini?

Er tað ikki júst Heimastýrislógina Høgni ikki vil broyta?

Høgni - gevst at villeiða fólkið. Viðurkenn, at tað arbeiðið tit skuldu gera í serligu politinevndini er miseydnað.

Gevst at misbrúka tey fólk, sum sita eftir í politinevndini, tí tey hava als einki skil fyri, hvat politi er fyri nakað og hava tí ikki neyðuga førleikan at greina málið fult forsvarligt.

Gevst við tíni hysterisku politisku framtúran í rættar- og politimálinum, tí tú setur rættartrygd føroyinga í stóran vanda.

Og ikki bara tað - mær er komið fyri oyra, at fittur partur av tí, sum tú hevur sagt vera kannað á ávísum stað, er als ikki kannað. Hetta er komið fram við eftirkannandi fyrispurningum. Tað var eisini sjón fyri søgn í Degi og Viku 2. oktobur, tá tú sjálvur bar fram soleiðis: "Vit hava ikki fingið innlit í ... politi seinastu 3 árini", løgmálaráðið hevur ikki vilja lata nakrar dyr upp.

Hervið bleiv váttað, at alt annað hevur verið lygn.

Er tað so, at tú ber fram ósannindir í so týdningarmiklari nevnd og so týdningarmiklum máli - bert av reinari yvirtøku- og maktgyrnd?

Høgni er eisini beinleiðis spurdur um hvørjar útrokningar fyriliggja. At vísa til eina bílagda Hvíta Bók sigur ikki nógv í hesum føri.

Hvar eru tínar keldur?

Hvar eru tínar neyvu útrokningar?

Hvørjar frimlar hevur tú brúkt fyri at koma til tínar 60 mió. krónur?

Skjalprógva tú hetta meiri enn at vísa á eina Hvíta Bók, tí eg veit fyri víst, at úr løgmálaráðnum í Keypmannahavn hava dyrnar verið stongdar fyri at geva tær allar neyðugu upplýsingarnar (tað hevur tú sjálvur váttað).

Eg vildi meint, at Høgni hevur ført seg fram á ein tílikan hátt, at misálit eigur at verða reist móti honum sum landsstýrismann.

Sum støðan er í dag ber alt fram móti einum framhaldandi ríkisfelagsskapi við danir - lat okkum gleðast um tað. Tí vil eg enn einaferð taka fram útsagn frá Sambandsflokkinum um at "...felags løgregla er eitt av grundleggjandi málunum í einum ríkisfelagsskapi".

At enda. Í dimmalætting 9. oktobur hevði Høgni Hoydal grein har eg festi meg við 2 setningar, sum hann helst ikki fatar handla allar mest um hann sjálvan - "Í Føroyum er langt síðan farið langt út um mark". Ja - vit eru sera nógv, sum halda, at júst tú ert farin langt út um mark.

Hin setningurin var "Latið okkum eggja til at hvessa vitið - ikki til at skerpa óvitið". Væl ert tú vitugur maður, men tá talan er um vælferð og rættartrygd føroyinga, sýnist vitið ikki at strekkja langt hjá tær!


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




## VIÐMERKINGAR

Kreppan í rækjuflotanum

# Politiskt dirvi krevst

**v. Felagið Rækjuskip Jákup Egholm Hansen, form.**
*Tann 12. okt. 2001*

At rækjuflotin er í eini álvarsamari fíggjarligari kreppu er uttan iva blivið øllum kunnugt. Longu í mai mánaða 2000 gjørdi Felagið Rækjuskip alment vart við, at orsøk var at ørkymlast um gongdina. Rækjuprísirnir á serliga smáum rækjum vóru tá byrjaðir at falla, samstundis sum oljuprísurin var methøgur og fiskiskapurin ikki av tí besta. Gongdin síðani Felagið Rækjuskip gjørdi vart við støðuna hevur bert verið støðugt versnandi. Rækjuprísirnir á ikki bert smáum rækjum, men øllum rækjum eru falnir millum 30 og 45% bert í hesum árinum, og oljuprísirnir eru framvegis alt ov høgir. Eisini fjølmiðlarnir hava við jøvnum millumbilum umrøtt støðuna hjá rækjuflotanum, men hinvegin hava politikarar verið ógvuliga tigandi. Í mai 2001 fingu fiskimálaráðharrin, fíggjarmálaráðharrin og løgmaður eina munnliga kunning um støðuna hjá rækjuflotanum.

**Lítil politiskur áhugið fyri rækjuflotanum:**
Tað er ein uggi í neyðini, at tað umsíðir tykist at verða onkur løgtingslimur sum er nóg erligur og tímir og hevur dirvi til at takað trupuleikarnar upp alment. Hetta ger løgtingsmaðurin Jákup Suni Joensen í Dagblaðnum tann 8. okt. 2001, har hann ger vart við støðuna hjá rækjuflotanum, samstundis sum hann staðfestir, at hetta eisini er ein trupuleiki ið politiska skipanin má fyrihalda seg til. At Jákup Suni Joensen hevur dirvið til at siga tað sum flestu aðrir politikarar helst vilja tiga burtur, eigur hann rós og eina tøkk uppiborna fyri.

Jákup Suni Joensen nevnir eisini, at fyri allar politikarar er er tað eitt eymt mál, sum fáir tora at hugsað um og tíðansheldur at nevna, og hetta er sera beinrakið sagt. Felagið Rækjuskip hevur í fleiri ár gjørt vart við, at politiska skipanin ikki hevur serligan áhuga fyri rækjuvinnuni, helst tí har eru trupuleikar sum ein má fyrihalda seg til. Tað er so nógv meira populert sum politikari at standa á tingsins røðarapalli og tosa um hvussu gott tað gongur í Føroyum, og at vit ríða á einum alduryggi, m.a. orsakað av góðum fiskiskapi og prísum hjá feskfiskaskipum, flakatrolararum, nótaskipum og øðrum skipabólkum.

**Politisk líkasæla gongur ikki longur:**
Men nú gongur hetta ikki longur. Rækjuflotin hevur ongantíð havt nøkur "gullár" og harvið møguleikar at konsoliderað seg, og trupulleikarnir hjá rækjuflotanum eru tí nú so álvarssamur, at nú mugu politikarar takað bindið frá eygunum og fyrihalda seg til veruleikan. Og veruleikin í hesum førinum er, at nú standa politikarar yvirfyri einum valið. Antin má eitt ella annað slag av kreppuloysn finnast, ella má útvegast atgongd til lønandi veiðuøkir (t.d. Canada ella Grønland) sum skipini ikki sjálvi skulu gjalda fyri, ella skal tað meldast klárt út til vinnuna og til teir umleið 300 menninar sum sigla við teim 12 rækjuskipunum, at rækjuflotin skal takast av.

**FAS-líknandi skipan:**
Felagið Rækjuskip hevur í nógv ár víst politikarum á, at serliga støðan hjá rækjuflotanum, sum einamest fiskar í altjóða sjógvi ger, at tað er grundarlag fyri at tosa um onkra serskipan fyri slíkan fiskiskap. Fyri tað fyrsta er ikki neyðugt hjá Føroyum at lata annan fisk fyri hesi veiðurættindi, og fyri tað næsta, so eru nógvar eykaútreiðslur - serliga flutningsútreiðslur - sum aðrir skipabólkar ikki hava, tengdir at veiðu á so fjarskotnum leiðum sum rækjuskipini royna á. Landsbúskaparliga er gevur rækjuveiðan eitt munandi størri nettoavkast enn tær kvotur sum aðrir skipabólkar fáa tillutaðar við at landið letur annan fisk afturfyri, tí í veruleikanum er hetta ein null-loysn, har landið í øðrum fiskavirði rindar fyri "rávøruna" hjá slíkum skipabólkum. Landsbúskaparliga nettoavkastið av slíkum kvotum liggur tí einans í sjálvari virðisøkinigini frá rávøru til liðugtvøru.

Hetta átti at fingið politikarar at stuðla uppundir, at føroyski fiskiflotin fær fíggjarliga umstøður at troytað bæði verandi og nýggjar veiðumøguleikar í altjóða sjógvi. Felagið Rækjuskip hevur mælt til at gera eina FAS-líknandi skipan fyri fiskiveiðu í altjóða sjógvi. Eins og FAS-skipanin fyri farmaflotan, sum hevur til endamáls at fáa útlendsk skip skrásett í Føroyum, og harvið fáa skattainntøkur frá hesum skipum, skal ein FAS-líknandi skipan fyri fiskiskip í altjóða sjógvi hava til endamáls, at varðveita skattakrónurnar í landinum, og at vit gagnnýta tey rættindi vit eiga í aljóða sjógvi til fulnar. Ein slík lønarafturberingarskipan fyri veiðu í altjóða sjógvi vildi uttan iva eisini stimbra til royndir at troyta nýggjar veiður í altjóða sjógvi.

Politikarar kunnu ikki loyva sær at sláa seg til tols við, at nú rækjuskipini í ár kunnu keypa kvotur frá grønlendskum skipum, er ikki orsøk at gera meira. Fyri tað fyrsta er avmarkað hvussu nógv kann keypast, og harnæst er keypsprísurin høgur og landið rindar onki av hesum - tað mugu rækjuskipini sjálvi gera. Tað kann heldur ongantíð verða meiningin, at slík keypt rættindi skulu gerast høvuðsvirksemi hjá rækjuflotanum, tí tá vilja føroysku veiðurættindini á Flemish Cap og við Svalbard liggja óbrúkt. Politikarar mugu skipað soleiðis fyri, at gagnnýtslan av føroyskum rættindum gerst so mikið lønandi fyri skipini, at skipini fyrst og fremst gagnnýta hesi, meðan keypskvotur úr Grønlandi ella aðrastaðni frá eiga at verða ein eyka møguleiki sum kann geva eitt eyka peningaligt ískoyti.

**Vísi politiskt dirvi:**
Felagið Rækjuskip hevur so oftani fyrr uppliva tær afturhaldskreftir sum finnast í hesum landi millum "frøðingar" av ymsum slag, hvørs høvuðssjónarmið er, at fyrrheldur skal rækjuflotin og tey 300 arbeiðsplássini ofrast, enn at skipast skal fyri nakrari nýskapan innan hjálpartiløk (sum t.d. ein FAS-líknandi skipan). Vinnan er sjálvandi ikki samd við sjónarmiðjunum hjá slíkum "frøðingum", og vit vóna at politikarar umsíðir vilja fyrihalda seg til veruleikan og vísa dirvi til at finna loysnir, heldur enn framhaldandi at goyma seg aftan fyri ræðumyndirnar um ørskapin í studningsvinnuni í 80´unum - forrestin ein studningsvinna sum ikki fevndi um rækjuflotan - ella latað seg ræða av afturhaldskreftunum í landinum.

Um tað frá politiskari síðu er ein vilji at gera nakað, so skal tað ikki standa á frá vinnunar síðu at hjálpa til við hugskotum og at hjálpa til við arbeiðinum at finna loysnir.



Høgifossur


